Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Fra: Edmund Jacobsen, edmund_jacobsen@hotmail.com
Dato: 07.02.01
Til: birgir@sosialurin.fo
Emne: VIKUSKIFTI

**TELDUBRÆVIÐ**

# Brennandi fløgumentan

»Hattar má roynast«, hugsaði eg, tá ið eg fyri umleið tveimum árum síðani sá ein vinmann demonstrera ein nýggjan, glitrandi fløgubrennara.

»At hugsa sær! Allar krónurnar tú kanst spara við at margfalda fløgur, ístaðin fyri at keypa tær. Pínadoy sum tað er smart«, hugsaði eg víðari, meðan eg brosaði og fekk jólaljós í eyguni.

Eg má viðganga, at eg í dag havi broytt meining. Lat meg greiða eitt sindur frá mínari støðu, kæri lesari.

Eg havi altíð keypt nógvar fløgur. Og áðrenn fløgurnar byrjaðu at dominera marknaðin síðst í 80'unum, keypti eg nógvar LP-plátir. Tá ið eg gekk í studentaskúla miðskeiðis í 80'unum, hevði eg eina kvotu uppá gott og væl tvær plátur um mánaðin. Satt at siga hevði eg ikki ráð, men uppá ein ella annan máta, fekk eg skava nokk av peningi saman til at keypa minst tvær LP-plátur um mánaðin. Onkuntíð bæði tríggjar og fýra, men so var fíggjarætlanin eisini rokin so væl og virðiliga, og eg var noyddur at roykja ball restina av mánaðinum, ið stadin fyri Prince.

Jú, tað er heilt vist. Rokkur skuldi til fyri at halda ein ungan eysturoying koyrandi!

Men sjálvt um eg uppá hendan mátan fekk dyrkað teir rokkbólkar og solistar, mær dámdi best, so vóru tað altíð »marginalar« plátur, ið eg ikki hevdi ráð at keypa. Men tað gjørdi nú einki. Sum oftast hevði onkur vinmaður keypt onkra av hesum plátum, og so var bara at møta upp við einum kassettubandi og taka plátuna uppá band.

Sostatt kann man siga, at tónleikanýtslan varð býtt í tveir bólkar; einar 12-16 plátur um árið, ið eg bara var noyddur at keypa, og so tær »marginalu« pláturnar, ið eg tók uppá band hjá onkrum vinmanni.

Hettar nýtslumynstrið helt sær fram til '97. Eg blev liðugur við útbúgvingina, fekk arbeiði og pening á bankabókina, og tónleikanýtslan vaks munandi. Onkuntíð upp í 6-8 fløgur um mánaðin.

So kom tann stóri dagurin, tá ein vinmaður keypti ein fløgubrennara til telduna. Og knappliga keypti hann ikki fleiri fløgur. Vanligar tónleikafløgur, altso. Nei, hann fór niðan á bókasavnið her í Esbjerg, lánti einar 10-15 nýggjar, góðar fløgur, og margfaldaði tær allar samlar. Ljóðgóðskan var – sum tit nokk vita – í topp.

Ein dagin hevði ein, ið eg arbeiði saman við, keypt nýggjastu fløguna við danska sangaranum Poul Krebs. Tað vardi ikki leingi, so hevði hann margfaldað eintøk til øll á arbeiðsplássinum. Eisini til mín.

Hettar var bara sakin! í staðin fyri 140 krónur hevði eg fingið fløguna fyri 15 krónur.

Men so byrjaði ringa samvitskan spakuliga at gerða seg galdandi.

Tað kann gott verða, at eingin uppdagar tað, og at tað ikki kennist sum stuldur, men at margfalda fløgur, ið ein ikki hevur keypt er stuldur og einki annað! Michael Jackson, ella Britney Spears fara neyvan at líða nakra neyð av slíkun stuldri, men soleiðis er tað slettis ikki við yrkjarum og tónleikarum, ið skriva á donskum. Fyri ikki at nevna føroyskar tónleikarar. Men tað venda vit aftur til.

Danskt er sera lítið mál, ið verður tosað av umleið fimm miljónum menniskjum, og ein sangari sum Poul Krebs selur kanska 100.000 fløgur, tá ið hann selur mest. Tað ljóðar kanska av nógvum, men tað eru rættuliga nógvar fyritøkur og personar, ið skulu býta vinningin frá einari slíkari útgávu. Tá ið saman um kemur, so hevur ein kendur tónleikari sum Poul Krebs ikki ráð til nógv meira luksus, enn ein stjóri í einari lítlari fyritøku ella ein góður, føroyskur fiskiskipari. Og tað er honum væl unt.

Soleiðis førdi mín ringa samvitska til, at eg aftaná einans tveir dagar tveitti heimabrendu fløguna við Poul Krebs í ruskspannina.

Her vilt tú, kæri lesari, nokk halda, at eg bara spæli heilagur. Ok, tað kann gott verða eitt sindur um tað, men les víðari. Søgan er ikki heilt liðug enn.

Sum tónleikari havi eg óiva eitt sindur øðrvísi hugsunarhátt og eitt sindur meira innlit í tónleikaframleiðslu enn meirilutin av vanligu lurtarunum.

Fyri kortum hoyrdi eg ein føroying, ið hevur skil fyri fløguútgávu siga, at fyri hvørjar 500 fløgur, ið verða seldar, verða umleið 500 aðrar ólógliga margfaldaðar. Tað kann gott verða at hann hevur lagt nakað afturat, men heimabrenning av fløgum er ein sera stórur trupulleiki.

Royn og hugsa eitt sindur um hettar, kæri lesari. Eg veit frá egnum royndum, hvussu torført tað er at geva út tónleik í Føroyum. Føroyskir tónleikarar og bólkar gera ikki fløgur fyri at vinna pening. Nei, tað er rein og sker idealisma! Tað er ikki óvanligt at skylda 100.000 ella 150.000 krónur, tá fløgan er komin út. Upptøkur, ljóðblanding, framleiðsla av fløgum o.s.v. Tað kostar!

Og nú er tað eisini soleiðis, at ein stórur partur av føroysku tónasmiðunum eru alt ov stoltir til at senda eitt vánaligt avrik í handlarnar. So nógvur peningur verður nýttur til at fáa fløguna so góða sum gjørligt.

Føroyskar tónleikaútgávur hava eisini tann trupulleikan at berjast við, at sjálvt um tær selja væl eftir føroyskum umstøðum, so er føroyski marknaðurin alt ov lítil til at hesar útgavur bera seg fíggjarliga. Eitt stórt, larmandi undirskot er beiski bitin, ið meirilutin av føroysku tónleikaútgevarunum muga svølgja fyri at servera eitt gott avrik fyri kræsnu keyparunum og lurtarunum

Tískil haldi eg, at margfalding av fløgum kann gerast ein bumba undir føroyskum tónleikaútgávum. Eitt so lítið og viðbrekið mál, sum tað føroyska, tørvar eisini tónleik á føroyskum. Og tað verður sera fátæksligt, tá ið føroyskir tónleikarar ikki longur fara at tora at geva út tónleik. Føroyska tónleikamentanin kann – um eg so má siga – margfaldast til deyðis!

So næstu ferð tú fært eina heimabrenda fløgu, so send ein vinarligan tanka til føroysku tónleikararnar, blaka fløguna í ruskspannina og far so út og keyp upprunafløguna. Bæði føroyska tónlistamentanin og tín samvitska fáa tað betri um so verður bori at.

# Ungar stjørnur



KRISTIN Í TÓNLEIKI
*Elinborg Joensen*

»Hey, eg eiti Rannvá, og eg eiti Rebekka – og vit eru CREAMY!«

Jú, øll kenna vit tær, hesar ungu genturnar, sum longu hava roynt eitt sindur av hvørjum. Og nú, skjótt eitt ár er liðið, síðan tær seinast vóru á palli í Føroyum, koma tær aftur.

Hvør kennir ikki »Æblemand« og »Krabbesang« og mín sann um ikki eisini føroyska sangin »Tillukku í dag«? At tær syngja føroyskt, er at fegnast um. Hvør veit, um føroyska málið verður heimskent saman við Creamy!

Men hvussu blivu tær kendar?

Ein summardag í mai '99, komu Rannvá og Rebekka inn til plátufelagið RecArt Music. Tær vóru ikki sørt smædnar. Kortini hildu tær uppá, at »plátustjórin« skuldi hoyra sangir teirra. Tær høvdu saman við framleiðarunum »Darwich & Garcia« spælt 5 sangir inn. Tað vóru sangir, sum vóru sera vælumtóktir hjá teirri stóru barnaáhoyrarafjøldini – »Æblemand« var ein teirra. Stjórin í RecArt Music, sum ongantíð áður hevði havt vitjan av so ungum gentum, sá beinanvegin møguleikarnar hjá teimum. Tá smædni var um at renna av teimum, skrúvaðu tær sjarmuna frá. Og innan eitt samdøgur eftir vitjanina, høvdu tær fingið plátusáttmála.

Her byrjaði eitt spennandi ævintýr, har hæddarpunktini mundu vera, at Creamy var ársins mest selda fløga, bert uppá 4 mánaðar, og fekk Grammy virðislønina fyri ársins bestu barnaútgávu. Creamy vóru tær yngstu, sum nakrantíð hava fingið Grammy virðislønina. 31. august sama ár var fyrsta fløgan hjá teimum á marknaðinum. Hon seldi heili 200.000 eintøk. Og eisini fingu tær høvi at framføra fyri ikki færri enn 700.000 fólkum live. Hetta var bæði til »Grøn konsert« og »Åh Abe«.

Eg haldi meg hava hoyrt í eini samrøðu við foreldrini hjá Rannvá, at hon ikki vildi fara uttanlands at syngja, uttan hon visti, at tað var eitt kall frá Guði. Men ber tað t.d. til at syngja á Grøn Konsert í Danmørk og vera kristin? Og um tað er eitt kall frá Guði, áttu tær so ikki eisini at sungið kristnar sangir, sum boðaðu evangeliið út til áhoyrararnar? Jú, tað gera tær eisini. Eitt sindur í hvussu er.

Umframt, at fløgan hjá Creamy var tann mest selda í 1999, fingu tær 4 ferðir platin fyri teirra framúr frambrot. Og á almenna hitlistanum í Danmørk, eru tær á einum væl uppibornum 2. plássi. Einans Beatles við teirra 1'ara er frammanfyri tær. Á seinastu fløguútgávuni »We Got The Time« eru 10 nýggir sangir og tveir cover. Tað eru Little Kitty (The Walkers) og Never Ending Story. Haraftrat er kristiligi sangurin »It can happen to you«. – Vit eru kristnar, og tað vilja vit ikki skammast við, siga tær báðar. Undan hvørjari konsert biðja tey øll saman, eisini sjálvt um hini í bólkinum ikki eru kristin. Stílurin á nýggju fløguni er klárt Happy Dance. Sangirnir eru framleiddir av ymiskum framleiðarum, m.a. Hartmann og Langhoff, ið er kendur frá Aqua – Hirtsville, kendur frá A-Teens og Dean, sum er kendur frá Me & My. Sangirnir fanga oyra, og eru sera eyðkendir.

Men altso – ársins konsert við størsta navni á okkara leiðum: Creamy í Ítróttarhøllini í Runavík, í dag kl. $17^{00}$.



# ítróttur

Nr. 29 • leygardagur • 10. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# VÍF ætlar at greipa greipuna



**Uttan at taka nakað frá mótstøðuliðunum kann staðfestast, at talan í báðum steypafinalunum verður um greiðan favorittleiklut hjá vestmenningum. Hett nýtist tó ikki at merkja, at talan ikki verður um spennandi dystir**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Kyndil gjørdi tað í fjør, VÍF fyrraárið, og nú ætla vestmenningar enn einaferð at gera tað. Tað, sum vit tosa um, er sjálvandi møguleikin hjá VÍF at vinna báðar finaludystirnar, sum leiktir verða í Ítróttahøllini á Hálsi í dag.

Gera vestmenningar tað, hava liðini bæði samstundis møguleika fyri at skriva søgu. Tað er nevnliga ongantíð áður hent, at eitt og sama felag hevur megnað at vunnið at vunnið greipuna hjá bæði monnum og kvinnum í sama kappingarárið. Einu greipu av greipu, ella eina quatro, um tú vilt.

### VÍF er favorittur

Hin fyrri av teimum báðum finaludystunum er tann hjá kvinnunum, har VB og VÍF skulu takast.

Einki er at ivast í, at talan her er um tey bæði liðini, sum í løtuni eru best fyri í landskappingini. Har fekk VÍF tó eitt avgerandi fet móti gullinum frá VB, tá vágskvinnurnar innan hálvan minutt søplaðu stig burtur móti Stjørnuni.

Burtursæð frá hesi lagnutungu løtuni, hevur VB at kalla verið flúgvandi seinastu dystirnar, og í seinnu hálvfinaluni í steypakappingini prógvaðu tær eisini, at tað ikki bert snýr seg um tær báður útlendsku. Tá hesar vórðu mansvardar í stórum parti av dystinum, traðkaðu aðrar til, og millum annað tóktist unga Laila Jespersen at fáa sítt stóra gjøgnumbrot í júst hesum dystinum.

Hóast VB er væl koyrandi, so noyðast tær úr VÍF tó at átaka sær leiklutin sum favorittar til dystin.

Liðið hevur verið at kalla einaráðandi higartil í ár, og sjálvt spælið er eisini vorðið meira og meira sannførandi. Blandaði hópurin hevur funnið sera væl saman, og hóast tær kanska hava trupulleikar av, at hópurin er heldur smalur, so er tað fólkið, sum er, sera gott.

Eins og hjá VB hevur VÍF prógvað, at heldur ikki her er tað nøkur patentloysn at royna seg við mansverju.

Hetta kann kanska meira enn nakað annað borga fyri einum undirhaldandi dysti, har liðini royna at spæla seg til sigurs upp á egnar dygdir, heldur enn at skerja mótstøðuliðið við at taka eina ella fleiri av mótstøðuleikarunum úr spælinum.

### VÍF er favorittur

Kanska heldur lesarin, at tað er eitt mistak, at sama millumyvirskrift stendur tvær ferðir á rað, men so er ikki.

Eins og hjá kvinnunum er VÍF nevnliga eisini favorittur hjá monnunum, og her er favorittluturin kanska enn størri.

Vestmenningar hava í landskappingini verið so nógv tað besta liðið, og hóast Kyndil fekk ein javnleik í grundspælinum móti teimum, so tykist hetta ikki at nerva á nakran hátt. Á øllum plássum er liðið sera væl fyri, og at hópurin er so breiður, sum hann er, merkir so eisini, at skiftisleikarar kunnu koma inn, uttan at hetta nervar nakað stórvegis.

At peika á lyklaspælarar, sum kunnu setast úr spælinum fyri at vinna dystin, er eisini torført. Kvaliteturin á spælarunum er snøgt sagt somikið stórur, at teir í allar mátar eiga at metast sum favorittar.

Hetta merkir tó ikki, at StÍF er heilt uttan møguleika at vinna, tí tað eru teir sjálvsagt ikki.

Nú bæði John og Sveinbjørn eru við aftur, fer liðið alt meira at líkjast FM-liðnum frá 1999, so eingin kann vera í iva um, at møguleikin er til staðar. Skal StÍF vinna dystin, krevur hetta tó, at teir eisini finna spælið frá 1999 fram aftur. Skjóta ágangandi álopsspælið, samantvinna við eini sterkari verju, er ein avgerandi fortreyt fyri sigri á VÍF, og helst eru strandingar eisini grieðir um hetta.

Teir verða tí noyddir at geva alt tað, teir eiga, um takið skal eydnast, men hinvegin – tað ætla vestmenningar eisini.

Hvussu alt hetta fer at spæla, verður tó ikki til annað enn gitingar, og tí fara vit bert at enda við at ynskja bæði leikarum og viðhaldsfólkum tveir góðar hondbóltsdystir.

# Dystir higartil í ár

Hetta kappingarárið hava mótstøðuliðini í finalunum hitt hvørt annað tvær ferðir. VÍF hevur vunnið allar hesar uppgerðirnar, og niðanfyri verður víst, hvussu hevur skorist hjá einstøku leikarunum í hesum dystum.

| rk | út | gk | mál | VÍF | - | StÍF | mál | gk | út | rk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 27 | - | 22 | | | | |
| | | | | 40 | - | 27 | | | | |
| | 3 | 2 | 20 (3) | Ingi Olsen | | Artur Johansen | 16 (5) | | | |
| | | | 10 | Sámal Joensen | | Marius Petersen | 9 (1) | 1 | 1 | |
| | 1 | 1 | 10 | John Zachariasen | | Costin Dumitrescu | 9 | 1 | | |
| | | | 8 | Martin Hummeland | | Poli Hansen | 5 | | 1 | |
| | 1 | | 7 | Johnny Joensen | | Alexandur Johansen | 3 | | 1 | |
| | 2 | | 5 | Áki Olsen | | Andre Danielsen | | 3 | | |
| | | | 2 | Harald Bjørgvin | | Kristjan Petursson | 1 | | | |
| | 1 | 1 | 2 | Danut Negro | | Pauli Poulsen | 1 | 2 | | |
| | | | 1 | Rógvi Nielsen | | Janus Trygvason | | 1 | | |
| | 2 | | 1 | Sjúrður Holm | | Leivur Justinussen | 1 | 2 | | |
| | | | 1 | Sveinbjørn Poulsen | | Jón Rasmussen | | 1 | 1 | |
| | 1 | | | Bárður Nielsen | | | | | | |

| rk | út | gk | mál | VB | - | VÍF | mál | gk | út | rk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 23 | - | 26 | | | | |
| | | | | 19 | - | 32 | | | | |
| | 1 | | 23 (11) | Regina Radó | | Ioana Rápa | 16 (2) | 2 | | |
| | 2 | 2 | 6 | Andrea Lütz | | Nicolina Eyðbjørnsdóttir | 10 | 2 | 1 | |
| | | | 5 | Gurið Mortensen | | Nicoleta Radu | 10 | 1 | 3 | |
| | | | 3 | Eyðbritt Krosslá | | Fríða Marjunardóttir | 9 (1) | 2 | | |
| | | 1 | 2 | Rannvá Augustinussen | | Sóleyð Mikkelsen | 8 (3) | | | |
| | | 1 | 2 | Maria Winther | | Randi Kúrberg | 4 | 2 | | |
| | 2 | | 1 | Sólrun Krosslá | | Alice Høghamar | | 1 | | |
| | | 1 | | Mary Krosslá | | | | | | |
| 1 | | | | Margreth Augustinussen | | | | | | |